## Rijkaard bangin um Messi

Tað kann væl vera, at talan var um heilt álvarsligan skaða, sum noyddi Lionel Messi av vøllinum, tá Barcelona í gjárkvøldið vann 1-0 á Celtic í europisku meistarakappingini. Frank Rijkaard, venjari hjá Barcelona, sigur við spanskar miðlar, at nógv bendir á, at talan er um skaða í hælsinuni. – Nú fáa vit at síggja, hvat læknarnir siga, men eg vóni ikki, at skaðin er somikið álvarsligir, sum vit bera ótta fyri, sigur Rijkaard sambært sponsku bløðunum.



## Tvær ferðir Kyndil

Tveir dystir verða spældir í fremstu hondbóltsdeildunum í kvøld. Hjá kvinnum hevur Kyndil heimavøll móti Stjørnuni, og byrjar tann dysturin klokkan 18.30. Klokkan 20 spæla mansliðini hjá Kyndli og H71. Her hevur Kyndil enn møguleikan at røkka FM-finaluni, men tað krevur mest sannlíkt tríggjar sigrar á rað, og tí eru ráðini ikki til at kiksa, nú H71 vitjar.

# HB er favorittur



*Dysturin um føroyameistaraheitið í 2008 fer at standa millum verjandi meistararnar og mest vinnandi liðið í føroyskum fótbólti, stendur tað til NordicBet*

**Á NordicBet hava tey sett odds á, hvussu útlitini eru fyri komandi kappingarárinum í føroyskum fótbólti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skal gangast eftir tí, sum NordicBet metir, so er Skála fremsti kandidaturin til niðurflyting komandi kappingarár. Í øllum førum fáast pengarnir heilar 235 ferðir aftur, um Skála verður føroyameistari í 2008. Og tað er munandi meira enn eitt nú B68 og ÍF geva.

Kapprenningin um meistaraheitið verður annars ein dystur millum HB og NSÍ, meðan EB/Streymur verður mett sum vandamesta móttstøðuliðið hjá teimum báðum sambært veddingarfyritøkuni.

Á heimasíðuni hjá NordicBet ber annars til at spæla um hópin av ymsum útfallum. Eitt nú um Hanus Eliasen skorar fleiri mál enn Jónhard Frederiksberg, ella um B68 endar framman fyri Víking, tá kappingin er av.

Eisini eru odds sett á stórsteypadystin millum NSÍ og EB/Streym, eins og fyrstu umførini av steypakappingini longu nú finnast á listanum.

**FAKTA**

**FM-odds frá NordicBet**

| | |
|---|---|
| HB | 3,00 |
| NSÍ | 3,50 |
| EB/S | 4,00 |
| B36 | 5,50 |
| KÍ | 7,00 |
| B71 | 14,00 |
| Víkingur | 14,00 |
| B68 | 75,00 |
| ÍF | 120,00 |
| Skála | 235,00 |

## Sveinur formaður í Kappingarnevndini

**Tað tykist mest sum vera siðvenja, at nývaldir FSF-limir fáa formansskapin í Kappingarnevndini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bæði Bjarki Mohr og Høgni í Stórustovu gjørdust nevnliga formenn í Kappingarnevndini, tá teir vórðu valdir í FSF-nevndina á sinni. Í so máta breyt Niclas Davidsen siðvenjuna, fyri einum ári síðani, men nú er Sveinur Tróndarson so maðurin, sum skal standa á odda fyri ymsu kappingunum, sum eru undir FSF.

Starvsnevndin, sum varð endaliga mannað á aðalfundinum leygardagin, hevði sín fyrsta fund í gjár, og har vórðu ymsu nevndirnar skipaðar, sum víst niðanfyri.

**Fíggjarnevnd**
Høgni í Stórustovu, formaður
Rúni Heinesen, nevndarlimur
Magnus á Stongum, nevndarlimur

**Kappingarnevnd**
Sveinur Tróndarson, formaður
Rúni Heinesen, nevndarlimur
Karl Vidtfeldt, nevndarlimur

**Útbúgvingar- og menningarnevnd**
Rúni Heinesen, formaður
Niklas á Líðarenda, nevndarlimur
Sveinur Tróndarson, nevndarlimur

**Dómaranevnd**
Niklas á Líðarenda, formaður
Niclas Davidsen, nevndarlimur
Karl Vidtfeldt, nevndarlimur

**Lógar- og sáttmálanevnd**
Høgni í Stórustovu, formaður
Christian Andreasen, nevndarlimur
Sveinur Tróndarson, nevndarlimur

**Landsliðsnevnd**
Magnus á Stongum, formaður
Niclas Davidsen, nevndarlimur
Karl Vidtfeldt, nevndarlimur



*Sveinur Tróndarson varð valdur uttan atkvøðugreiðslu, tá hann var einasta uppskotið til nevndarsessin, ið stóð tøkur eftir Høgna í Stórustovu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Daiva heldur fram í VB

Hóast vánirnar fyri næstu FM-finaluni á rað minkaðu nógv, tá VB um vikuskiftið tapti móti Neistanum, so høvdu tey í felagnum kortini eisini nakað at fegnast um.

Daiva Toumaite hevur seinnu árini verið mett millum tær allar bestu í føroysku hondbóltskappingini, og á heimasíðu felagsins hevur VB nú boðað frá, at skotsterki litavin tekur í øllum førum eitt ár afturat í felagnum.

**-mørk**



## Tipsbladet er nú søga

Portohækkingarnar, sum fyri fáum árum síðani raktu donsku bløðini á føroyska marknaðinum, hava nú noytt Tipsblaðið av føroysku handilshillunum.

Vikublaðið skrivar á heimasíðu sínari, at sølustjórin hjá blaðnum, Henrik Pallesen, nú hevur tikið avleiðingarnar av, at sølan í Føroyum og Grønlandi er follin so nógv seinnu árini. Samlaða sølan hjá blaðnum hevur minkað við 20%, og tí eru boðini, at tað skal sparast, har nakar møguleiki er fyri hesum.

**-mørk**

## Anderson í Klaksvík

Í gjár var nýggi spælarin hjá KÍ, Anderson, at síggja á vøllinum við Djúpumýru fyri fyrstu ferð.

Upprunaliga skuldi KÍ hava tilgongd av argentinskum áleypara, Julian Tridente, men tá hesin kortini ikki slapp leysur av felag sínum, valdi KÍ at gera skjótt av í royndunum at fáa nýggjan spælara, áðrenn flytingarvindeygað læt aftur.

Úrslitið gjørdist, at Anderson, sum annars er sáttmálabundin at Vasco da Gama, skal spæla við KÍ, og í kavaslettinginum í gjárkvøldið royndi hann seg fyri fyrstu ferð saman við nýggju liðfeløgunum.

**-mørk**